# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 182/2007: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse"**

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, hevur lagt málið fram tann 23. apríl 2008, og eftir 1. viðgerð tann 6. mai 2008 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 13. og 15. mai 2008.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Samtak, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Landsfelag Handverkaranna, Føroya Handverkarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Reiðarafelag, fútan og landsstýriskvinnuna.

Frá Samtak hevur nevndin fingið skriv, dagfest 13. mai 2008, við uppskoti til broyting í lógaruppskotinum. Frá Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur nevndin fingið avrit av hoyringsskrivi til uppskotið. Frá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur nevndin fingið skriv, dagfest 13. mai 2008, við viðmerkingum til uppskotið saman við avriti av avtalu millum íslendsk arbeiðsgevarafeløg og løntakarafeløg um útlendingar á íslendska arbeiðsmarknaðinum og yvirlit yvir arbeiðsloysi í Føroyum í tíðarskeiðnum 2000 – 2008 skift á mánaðir, og 14. mai 2008 teldupost viðvíkjandi hagtølunum, sum á fundi vórðu flýggjað nevndini. Frá Føroya Reiðarafelag hevur nevndin fingið skriv, dagfest 14. mai 2008, við viðmerkingum til uppskotið. Frá Løgmálaráðnum hevur nevndin m.a. fingið teldupost, sum umrøður spurningin um mannagongdina í sambandi við at broyta prosentmarkið.

Ein **samd nevnd** viðmerkir, at týdningarmikið er við kunning, upplýsing og neyvum eftirliti til tess at hava skipaði viðurskifti á útlendingaøkinum.

Arbeitt verður við ítøkiligari ætlan at seta á stovn Útlendingastovu, sum í fyrsta umfari skal umsita tann partin av útlendingamálum, sum í dag verður umsitin í Løgmálaráðnum, og sum snýr seg um at ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Eyðsæð er, at hesin stovnur eisini fær sum uppgávu at upplýsa um lóggávu, mannagongdir v.m. á økinum, vegleiða útlendingar um ítøkilig mál, eins og stovnurin saman við øðrum viðkomandi pørtum ger kunnandi tilfar.

Hvat viðvíkur eftirlitinum, so hevur fútin størsta partin av eftirlitinum á økinum um hendi, og hann hevur m.a. heimild til sambært útlendingalógini av egnum ávum og í samstarvi við aðrar myndugleikar at seta í verk kanningar, t.d. av serstakari vinnugrein. Fútin hevur á fundi við nevndina upplýst, at talið av málum um brot á útlendingalóggávuna er fallið munandi, og at hetta fall samsvarar miðvísu eftirlitsátøkunum, sum hava verið gjørd seinastu árini. Fútin viðmerkti samstundis, at § 4, stk. 3, sum ásetir innihaldið í arbeiðsgevaraváttanunum, og partvís samsvarar við nýligu samtyktu lógina um setanarprógv, er greið og betrar um møguleikarnar at prógva møgulig brot á útlendingalógina. Nevndin metir ikki ítøkiligar orsøkir vera at gera broytingar í eftirlitsskipanunum.

Undir nevndarviðgerðini hevur verið umrøtt, um ávísar stuðulsskipanir kunnu gerast ein forðing fyri at veita arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir § 3, stk. 1, nr. 1 til ávís arbeiði. Sambært hesi áseting er tað ein treyt, at talan er um "ordinær beskæftigelse". Í serligu viðmerkingunum til ásetingina verður hugtakið lýst sum "beskæftigelse uden offentligt tilskud". Støða sæst ikki at vera tikin til, hvussu metast skal um t.d. fiskavirkisskipanina í ALS ella skipanina við minstuløn til fiskimenn í hesum høpi. Nevndin vísir á, at ein av grundgevingunum fyri lógaruppskotinum er, at tørvur er á arbeiðsmegi í flaka- og fiskivinnuni, og hesar skipanir eiga tí ikki at forða útlendingum at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir ásetingini. T.v.s. at arbeiði í flaka- og fiskivinnuni eisini er at meta sum "ordinært" sambært ásetingini.

Herumframt hevur nevndin býtt seg í ein **meiriluta** og ein **minniluta**.

**Meirilutin** (Jacob Vestergaard, Poul Michelsen, Marjus Dam og Alfred Olsen) viðmerkir, at upprunaliga vóru broytingarnar í útlendingalógini ætlaðar at gera tað smidligari hjá vinnuni at fáa útlendska arbeiðsmegi. Uppskotið byggir enn á hugsanina um fríari tilgongd av arbeiðsmegi, nú tó við teirri avmarking, at serligu reglurnar um arbeiðsmegi úr ES-londunum ikki skulu galda, um arbeiðsloysið í eitt samanhangandi tíðarskeið á í minsta lagi 3 fylgjandi mánaðir fer upp um 3,5%.

Meirilutin tekur ikki undir við hesi avmarking, og orsøkirnar til hesa støðutakan eru fleiri.

Eftir nevndarviðgerðina kann staðfestast, at góðar grundir eru at ivast í, um uppskotið loysir nakran trupulleika við vantandi arbeiðsmegi, tá saman um kemur. Sambært yvirliti yvir gongdina í arbeiðsloysinum seinastu árini, so hevur arbeiðsloysið í 6 mánaðir í 2004, alt árið 2005, og í byrjanini av 2006 verið oman fyri 3,5%, og alt hetta tíðarskeiðið hava arbeiðsgevarar havt trupulleikar av vantandi arbeiðsmegi. So hóast fríari tilgongd av arbeiðsmegi úr ES, so letur uppskotið ikki upp fyri nóg fríari tilgongd, sum kann loysa nakran trupulleika. Meirilutin viðmerkir samstundis, at hóast tað kann tykjast álítandi at knýta umsitingina at einum ávísum prosentsatsi, so sýnir talið ikki røttu myndina av arbeiðsloysisstøðuni í ymsu økjunum í landinum, eins og arbeiðsloysið í eini vinnugrein kann vera lægri enn í eini aðrari.

Herumframt er meirilutin ivingarsamur um tað í útlendingahøpi nýggja hugtakið í § 3, stk. 2 "særlige beskæftigelsesmæssige hensyn" samanborið við hugtakið "væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn" í galdandi útlendingalóg. Hugtøkini bæði knýta seg til tørvin á arbeiðsmegi í landinum, men úrslitið av tveimum málum kann gerast ymiskt, tí annar umsøkjarin er úr 3. landi, og hin er úr einum ES-landi. Útlendingur úr 3. landi, sum søkir arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir galdandi útlendingalóg, kann eftir eini ítøkiligari meting fáa noktandi svar, grundað á, at tørvur er ikki á arbeiðsmegi, meðan ein ES-borgari fær játtandi svar, tí tað við hugtakinum "særlige beskæftigelsesmæssige hensyn" fyri hansara viðkomandi frammanundan er definerað at vera tørvur á arbeiðsmegi, um samlaða arbeiðsloysið í landinum ikki hevur verið oman fyri 3,5% í eitt samanhangandi tíðarskeið á í minsta lagi 3 fylgjandi mánaðir.

At enda setir meirilutin spurnartekin við lóggávuháttin í sambandi við umrødda prosentmark, og serliga hvussu farast skal fram, um tørvur verður á at broyta prosentmarkið. Nevndin hevur fingið staðfest, at umsitingarliga ber ikki til at broyta

tulkingina, sum liggur í serligu viðmerkingunum, og tað er meiningsleyst at tosa um lógarbroytingar í hesum sambandi, tí prosentmarkið er ikki ásett í lógartekstinum, men bert umrøtt í serligu viðmerkingunum til § 3, stk. 2.

Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) § 3, stk. 2 verður strikað.

Soleiðis broytt mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Olga Biskopstø, John Johannessen og Mikkjal Sørensen) tekur undir við uppskotinum sum heldur fast við, at fría tilgongdin av arbeiðsmegi úr ES steðgar, tá arbeiðsloysið í 3 samanhangandi mánaðir hevur verið oman fyri 3,5%. Hóast arbeiðsloysið kann metast at vera serliga lágt, tá tað er niðri á 3,5%, er tað ein sannroynd, at arbeiðsloysið í veikastu økjunum samstundis kann vera fleiri ferðir so høgt.

Tó metir minnilutin tað vera neyðugt at kunna regulera prosentmarkið, um serlig viðurskifti gera hetta neyðugt. Hetta ber tó ikki til, eftir at fyriliggjandi uppskot er samtykt, tí markið er bert umrøtt í serligu viðmerkingunum. Landsstýriskvinnan hevur tó upplýst fyri nevndini, at hon eftir ólavsøku fer at leggja broytingaruppskot fyri tingið, ið hevur sum endamál at útvega henni heimild í kunngerð at broyta prosentmarkið. Hetta heldur minnilutin vera eina hóskandi mannagongd.

Minnilutin ásannar, at orsakað av, at vit ikki hava fult málsræði á hesum øki, kunnu lógarbroytingar til tíðir tykjast fløktar og ónøktandi. Tí fegnast minnilutin um, at landsstýrið skundar undir arbeiðið at yvirtaka málsræði á hesum øki, so føroysk lóggáva kann gerast, ið hóskar til føroyska samfelagið og politiska viljan her á landi.

**Rættarnevndin, 15. mai 2008**

| | | |
|---|---|---|
| Jacob Vestergaard<br>Formaður | Olga Biskopstø<br>næstformaður | John Johannessen |
| Poul Michelsen | Marjus Dam | Alfred Olsen |
| | Mikkjal Sørensen | |